# Býráðsfundur 22.06.2023

**<u>Býráðsfundur 22.06.2023 kl. 18.00</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**<u>Mál til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 54/2023 – Umsókn um stuðul til trampolin | ALMENT |
| Mál nr. 55/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 56/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 57/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 58/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 59/2023 – Heimild til Teknisku nevnd í summar | ALMENT |
| Mál nr. 60/2023 – Umsókn um keyp av lendi | ALMENT |
| Mál nr. 61/2023 – Umsókn um loyvi til umbygging | ALMENT |
| Mál nr. 62/2023 – Dagføringar á reinsiverkinum | ALMENT |
| Mál nr. 63/2023 – Umsókn um loyvi til umbygging | ALMENT |
| Mál nr. 64/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 65/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 66/2023 – | AFTURLATIÐ |

# Býráðsfundur 22.06.2023

**Mál nr. 54/2023 – Umsókn um stuðul til trampolin** **ALMENT**
J.nr.: 2001-6-2023

Tann 07.06.2023 søkir Bárður Kjeld, vegna nevndina fyri spæliplássið í Saltnesi, um stuðul til at umvæla trampolinina á spæliplássinum í Saltnesi, sum er illa farin.

Nevndin ynskir at skifta trampolinina út. Ein nýggj trampolin kostar kr. 9.900 v/mvg, sambært viðheftum tilboðið.

**Á fundi tann 13.06.2023 mælir Mentanarnevndin til at játta keyp av trampolin á kr. 9.900 v/mvg.**

**Á fundi, tann 14.06.2023 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini og at peningurin verður tikin av stovninum "Sparkivallar og spælipláss".**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Figgjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Tilmælini hjá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 59/2023 – Heimild til Teknisku nevnd í summar** **ALMENT**
J.nr.: 1101-8-2023

Tekniska nevnd hevur áður fingið heimild at avgreiða átrokandi byggimál og onnur átroðkandi teknisk mál í summarfrítíðini. Ynski er um, at Tekniska nevnd fær somu heimild í summarfrítíðini 2023.

**Á fundi, tann 14.06.2023, mælir Tekniska nevnd til at Tekniska nevnd fær heimild at avgreiða mál í summarfrítíðini.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 22.06.2023

**Mál nr. 60/2023 – Umsókn um keyp av lendi** **ALMENT**
J.nr.: 1205-3-2023

Í umsókn, dagfest tann 05.06.2023, søkir Leila M. Mortensen um uppískoytisstykki. Talan er um matr. nr. 127a, ið niðan fyri sethús hennara á Rókavegi 7 í Saltnesi.

**Á fundi tann 14.06.2023 mælir Tekniska nevnd til at játta keyp av lendi matr. nr. 127a.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 61/2023 – Umsókn um loyvi til umbygging** **ALMENT**
J.nr.: 1201-9-2023

Í teldubrævi, dagfest tann 08.06.2023, søkir Peter L. Gaardbo um at hækka sethúsini á Toftavegi 21, matr. nr. 558 áleið 50cm.

Ætlanin er at umvæla kloakkina, og tað ber ikki so væl til at bøta um kloakkina uttan so, at húsini kunnu hækkast. Kjallarin er lágur, og um grivið verður niður, so er vandi fyri, at kloakkin fer at liggja lægri enn verandi kloakk.

**Á fundi tann 14.06.2023 mælir Tekniska nevnd til at játta at húsini verða hækkaði 50cm.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 62/2023 – Dagføringar á reinsiverkinum** **ALMENT**
J.nr.: 1204-1-2023

Jóhan Petur Petersen frá Mest, sum arbeiðir við at dagføra reinsiverkið, hevur rátt kommununi til at seta automatiska returskoling í verk beinaveg sum ein part av heildarætli. Returskolingin skal gerast kortini, og vegna drúgva leveringstíð á ymisku deilunum, mælir Jóhan Petur til at kommunan setir arbeiðið í verk nú.

Kostnaðurin fyri automatiska returskoling er kr. 312.895.

**Á fundi tann 22.06.2023, mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum uppá returskoling uppá kr. 312.895 u/mvg.**

**Á fundi tann 22.06.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd. Mælt verður til, at 312.895 verða tiknar av stovninum "Reinsiverkið íløga".**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 63/2023 – Umsókn um loyvi til umbygging ALMENT**
J.nr.: 1201-10-2023

Í teldubrævi, dagfest tann 13.06.2023, søkja Mary og Jústinus Hansen um loyvi at umbyggja húsini á Heygsvegi 39, matr. nr. 427.

Ætlanin er at skifta klædningin og øll vindeyguni, umframt at flyta suðurendan 1,5m longri út (tó framvegis undir verandi úthangi).

**Á fundi tann 14.06.2023 mælir Tekniska nevnd til at játta umbygging sambært tekningum innsendar 12.06.2023.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**